

## Marian um trúgv

Í Rumenia eru flest fólk ortodoksir katolikkar. Tað er sera ópersónligt, og tað eru nógvir reglar og ritual. Í Føroyum bleiv eg positivt yvirraskaður av, at presturin í kirkjuni er so persónligur, og hann hevur eina gleði í tænastuni. Alt er meira opið, og fólk eru góð við hvønn annan. Eg kundi væl hugsað mær at gingið meira í kirkju

## Marian um føroyskan hondbólt

- Eg eri keddur av at siga tað, men støðið er lækkað, síðani eg kom hertil fyri seks árum síðani. Men tað eru nógvir ungir leikarar, sum kunnu koma langt, um teir vilja nakað við hondbóltinum. Her kann eg nevna Sveinur Justinussen, Rókur Akralíð og Regin Joensen

# Rumenski múrurin royum



hvussu tað ber til, at ein málverji við slíkari fortíð og slíkum evnum velur at koma til Føroya.

- Tað var Costin Dumitrescu, sum bað meg koma. Hann var leikandi venjari hjá StÍF tá, og hann fortaldi nógv positivt um Føroyar. Tá var eg eisini í einari serligari støðu í Rumenia. Eg var ikki so væl um sátt við fólkini rundanum mítt táverandi lið, og tí var tað náttúrligt at royna okkurt annað.

- Dinamo Bukarest góðu mær eisini eitt tilboð, men eg valdi heldur at koma til Føroya. Satt at siga var eg eitt sindur troyttur av proffesionellum hondbólti. Tað kann mangan vera ein hørð verð.

- Tá ið eg fór, visti eg ikki, um tað var rætta avgerðin at koma til Føroya. Men nú eri eg vísur í, at eg valdi rætt. Eg havi ongantíð kent tað sum eitt afturstig at koma til Føroya men heldur sum eina nýggja avbjóðing. Eg kenni meg heima á Strondum, og eg trívist á liðnum, hóast støðið er lægri enn í Rumenia, sigur Marian.

### Veit ikki hvat er heima

Marian hugsar tó onkuntíð um, at hann kundi havt spælt á hægsta stigi.

- Tá ið eg síggi HM í hondbólti í sjónvarpinum og síggi Kasper Hvidt, sum eg havi spælt ímóti, klára seg so væl, so hugsi eg sjálvandi, at "hatta kundi veri eg". Men tað er ikki nakað, sum plágar meg. Eg eri væl nøgdur við tað, sum eg geri. Eg haldi eisini at tað er spennandi at spæla stepakappingarfinalu í Føroyum, hóast eg ikki sleppi at spæla í HM, sigur hann smílandi.

Eftir hesi árini í Føroyum veit Marian ikki ordiliga, hvar hann følir seg mest heima.

- Tá ið eg eri í Føroyum, sakni eg Rumenia. Men tað løgna er, at eg sakni Føroyar, tá ið eg eri í Rumenia um summarið. Eg eri rættiliga ørkymlaður, tí at eg veit ikki, hvar eg skal búgva. Familjan er í Rumenia, og tað er torført at vera burtur frá teimum. Men eg og konan eru fallin sera væl til í Føroyum, og sonurin er føddur her, sigur Marian, sum tó væntar, at tey fara at flyta til Rumenia einaferð, tá ið hann gevst við hondbóltinum.

- Sum nú er vænti eg, at vit flyta aftur til Rumenia einaferð. Men tað er ikki einans til mín at avgera. Í Føroyum hevur sonurin eitt trygt umhvørvi at vaksa upp í, og møguliga fer hann at fella til her. Eg taki ein dag í senn, og eg kann ikki siga, hvat framtíðin ber við sær, sigur hann.

### Lesur í Rumenia

Marian og familjan eru í Rumenia um summarið. Tá vitja tey familju. Marian arbeiðir ikki nakað serligt teir mánaðirnar, hann er í Rumenia.

- Eg slappi av og vitji familju og kenningar, meðan eg eri í Rumenia. Annars lesi eg eisini til Master í High Performance Sports. Tað er ein útbúgving, sum eg kann nýta til at gerast venjari. Eg eri til próvtøkur, meðan eg eri í Rumenia, sigur Marian, sum hevur ætlanir um at gerast venjari, tá ið hann gevst at spæla hondbólt.

Um Maian fer aftur til Rumenia nú, er hann væl fyri fíggjarliga, men hann er tó ikki nakar ríkur maður.

- Livistøðið í Føroyum er høgt, men prísirnir eru eisini høgir. Tú sært ikki mun á fólki her. Øll eru miðalklassa. Í Rumenia eru summi, sum eru sera rík, men so eru summi bløðfátæk. Eg eri ein eitt lítið sindur yvir miðalklassa í mun til rumenskar umstøður. Eg kann hava ein penan bil og eina leiligheit. Tað eru ikki nógv fólk, sum hava ráð til leiligheit, sigur hann.

### Steypafinalan fyri 6 ferð

Marian er, um nakar, "mr. steypakapping". Hann hevur verið í steypafinaluni 5 ferðir og hevur vunnið 4 ferðir. Marian hevur eisini í hvørjari finalu víst stórspæl, og strandingar eru samdir um, at hann hevur stóran part av æruni fyri, at StÍF hevur verið einaráðandi í steypakappingini. Marian er spentur til leygardagin, tá ið StÍF og VÍF hittast í ársins steypafinalu.

- Steypakappingin er heilt vist hæddarpunktið í kappingarárinum. Eg vil vinna, men eg kann einki siga áðrenn dystin. Eg vænti, at tað verður ein spennandi dystur móti einum sterkum VÍF liði, sigur Marian at enda.

## Fakta

### Marian Cirloganescu

Føddur 25.01.1976
Heimstaður er Craiova
Giftur við Simonu úr Rumenia
Tey eiga ein son - Eric